# Festligt damucruise

Bindiklubburin, arbeiðsplássið, ítróttarliðið, vinkonurnar, damurnar í familjuni...fara við Norrönu 28. mai - 1. juni

## Hi ladies – so fara vit allar til sjós;-)

Lat bara sjeikarnar fara fótbóltsferð, at skjóta harur, fiska síl og fara eftir nátum, so kunnu vit taka okkum av heilt øðrum festligheitum saman við spennandi damum úr øllum landinum;-). Vit damur skulu nokk eisini eins og menninir koma heim við onkrum góðum fongi.

**Einans 1380 kr**
Íroknað ferð t/r, vælkomudrykkur, 3 rætta menu, fyrilestrar, shopping, damuparty vm.



### Shop till you drop

- Longsta gongugøta í Danmark
- Stórt shoppingsentur
- Secondhand torg
- Taxfree shopping



### Fancy Damuparty

- Tað heilt stóra damuparty
- Vit stása okkum upp
- Fancy damudrikkur
- Lekkur 3-rættað menu
- Roulette og Black Jack
- Karaokee og dansur



### Relax, Fit & Beauty

- Massaga og zoneterapi
- Neglaviðger, makeup vm. frá Wellness.fo
- Fyrilestur um Enneagram
- Stylecoaching við Anniku og Unu
- Hot Tub, svimjihylur, fitness og sauna
- Biografur, bingo, meditatión og beauty sleep



### Bílegg nú!

- Sigla hóskvøldið 28. mai kl. 21.00
- Eru í Esbjerg leygardagin
- Koma aftur 2. hvítusunnudag kl. 05.00
- Les meira á www.synergi.fo
- Bílegg pláss nú, tí tað er avmarkað pláss



Avmarkað pláss - Bílegg nú á www.synergi.fo ella ring 322355

Smyril Line · Synergi





# Ert tú okkara nýggi deildarleiðari?

**Tryggingarfelagið Føroyar hevur sum missión at skapa tryggleika og at seta kundan í miðdepilin. Nú kanst tú fáa ein týðandi leiklut í at røkka hesum máli. Sum leiðari á Skaðadeildini verður tú við til at tryggja eina fakliga góða og einsháttaða viðgerð av skaðum. Talan er um eina deild í menning, og tú, sum leiðari, sleppur at seta dám á hesa menning.**

Arbeiðsøkið fevnir í høvuðsheitum um at hava dagligu leiðsluna av skaðaviðgerðini og teimum starvsfólkum, sum har starvast, og styrkja kundatænastuna innan skaða, soleiðis at kundin í øllum viðurskiftum fær eina góða tænastu.

### Uppgávurnar fevna m.a. um

- at leiða og fordeila arbeiðið viðvíkjandi øllum privatum og vinnuligum skaðum
- at hava dagligu starvsfólkaábyrgdina av áleið 12 starvsfólkum og skiftandi næmingum
- at taka avgerðir í serliga truplum málum
- at støðugt dagføra arbeiðshættir og mannagongdir innan skaðaviðgerð

### Vit kunnu bjóða tær

Fjølbroytt og avbjóðandi starv í eini spennandi fyritøku, sum er í stórari menning. Eitt starv í eini fyritøku við greiðum málum, góðum arbeiðsumstøðum og virkisfúsum starvsfólkum, ið grunda sítt virksemi á virðini - vilja til lønandi vøkstur, virðing fyri heildini, ágrýtni og nærlagni, langtíðarhugsjón og broytingarsinni. Stórur dentur verður lagdur á starvsfólkatrivna og førleikamenning.

### Vit vænta

- at tú hevur hug og evnir at ganga á odda, og ganga nýggjar leiðir
- at tú hevur lætt við at samstarva, og dugir at fáa starvsfólk at virka væl saman sum eina eind
- at tú ert tænastusinnað/ur
- at tú megnar at taka avgerðir og fremja hesar í verki
- at tú ert fyrikomandi og fryntlig/ur

### Fyrimun hevur umsøkjari sum

- hevur leiðsluroyndir
- hevur løgfrøðisliga útbúgving ella royndir
- hevur ávísa tryggingarfakliga vitan

### Lønar-og setanartreytir

Starvið verður sett sambært sáttmála millum Yrkisfelagið Trygdina og Arbeiðsgevarafelagið fyri fíggjarstovnar í Føroyum. Lønin verður ásett í mun til royndir og førleika.

Er hetta nakað fyri teg, ella hevur tú spurningar til starvið, kanst tú seta teg í samband við Helga L. Petersen, deildarstjóra á tlf. 34 56 00 ella við at senda teldupost til hlp@trygging.fo.

Umsóknarfreistin er 15. apríl 2009 kl. 12.00.

Umsókn við avriti av viðkomandi prógvum skal sendast til:
Tryggingarfelagið Føroyar
Starvsfólkadeildin
Postsmoga 329
FO-110 Tórshavn

ella umvegis www.trygging.fo

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
- so ert tú tryggari